

Formaðurin í Føroya Oljuídnaði, Pauli Einarsson (vinstrumegin), avmyndaður saman við Árna Joensen, stjóra á Skipafelagnum. Pauli Einarsson er stak væl nøgdur við ráðstevnuna, sum hevur givið teimum vitjandi nakað av vitan um, hvussu stórt hjólið er, sum vónandi fer at mala um ikki so langa tíð

Mynd: Dia Midjord

# Útlendsku oljumenninir eru nøgdir við Føroyar

Oljugestirnir frá stóru útlendsku oljufeløgunum, ið eru á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum, vísa á, at samfelagið hjá okkum er væl fyrireikað, og føroyingar eru væl útbúnir.

DIA MIDJORD

Formaðurin í Føroya oljuídnaði, Pauli Einarsson, er stak væl nøgdur við oljuráðstevnuna, sum verið hevur í Norðurlandahúsinum báðar undanfarnu dagarnar.

– Tað, sum hevur verið áhugavert á ráðstevnuni, er, at allir teir útlendsku gestirnir vísa á, at samfelagið hjá okkum er væl fyrireikað. Talan er ikki um eitt útdeytt samfelag, sigur Pauli Einarsson.

Hann sigur viðari, at útlendsku gestirnir siga, at føroyingar eru væl útbúnir, og infrastrukturin er eisini á eini góðari leið.

– Infrastrukturin kann altíð útbyggjast, so hann nøktar tørvin, sum verður í sambandi við oljuvinnu í Føroyum. Útlendsku gestirnir eru av tí áskoðan, at vit klára at lofta einari komandi oljuvinnu, sigur Pauli Einarsson.

## Eitt fet á leiðini

Formaðurin í FOÍ sigur tað tiskil vera umráðandi, um vit ikki skulu verða tiknir á bóli, at vit í Føroyum fyrireika okkum sum frægast.

– Henda oljuráðstevna er eitt stig á vegnum. Ráðstevnan er eitt sindur teknisk og sigur ikki so nógv um broytingarnar í samfelagnum, men hon sigur, hvussu stórt hjólið er, sum fer at mala. Umráðandi er tí, at føroyingar fáa innlit í alt hetta, sigur Pauli Einarsson.

Hann heldur, at føroyingar hava prógvað, at vit megna at fylgja við hesi ógvusligu broyting og samstundis hava tamarhald á støðuni.

– 400 føroyingar møttu til ráðstevnuna fyrsta dagin, og í dag er aftur fult hús. Alt fyrigongur á enskum, so tað sigur eitt sindur um, at føroyingar kunnu fylgja við á øllum stigum, segði Pauli Einarsson í gjár.

Ætlanin er, at alt tilfarið frá ráðstevnuni, fyrilestrar og annað, skal savnast saman í ein bókling, sum so luttakandi stovnar og feløg fáa eitt eintak av.

## Amerada Hess:

# Vit hava fingið nógv burturúr

Kunningarstjórin hjá Amerada Hess, Andy Mitchell, er stak væl nøgdur við úrslitið av ráðstevnuni.
– Vit eru nøgdir og vónandi eru føroyingar eisini nøgdir, so tað kann ikki verða nógv betri, sigur hann.

DIA MIDJORD



Kunningarstjórin í Amerada Hess, Andy Mitchell, sigur tað vera umráðandi, at oljufeløgini og føroyska samfelagið skilja hvørannan

Mynd: Dia Midjord

Ein av monnunum frá Amerada Hess, sum hevur verið við til at lagt ráðstevuna til rættis, er kunningarstjórin, Andy Mitchell. Hann heldur, at Norðurlandahúsið er stak væl egnað til slíkar ráðstevnur.

– Hølið er væl egnað, maturin hevur verið stak góður, og starvsfólkini hava gjørt sítt ítarsta. Eg vóni, at føroyingar hava fingið okkurt burturúr hesi ráðstevnuni, tí vit í Amerada Hess hava verið ómetaliga væl nøgd, sigur Andy Mitchell.

Men hví hava tit fyriskipað eina slíka ráðstevnu.

– Orsøkin er, at vit í løtuni eru í holtur við fyrireikingarnar til oljuvinnuna. Skulu vit byrja at arbeiða, so vilja vit fyrst av øllum hava, at føroyingar vita, hvat tað er, sum vit eru í holtur við, sigur Andy Mitchell.

– Talan er um ein altjóða ídna við stórum oljufeløgum. Hetta kann virka hóttandi, um ein ikki kennir til oljuvinnuna. Føroyar er eitt lítið land, so tað er umráðandi, at báðir partar skilja hvørannan.

Andy Mitchell leggur aftrat, at oljuráðstevnan skal geva útlendsku oljufeløgunum møguleikan at kenna samfelagið Føroyar og vita, hvat samfelagið kann bjóða í eini møguligari oljuvinnu.

# Fiskirannsóknarstovan gjørt royndir við gluggameskum

Gluggameskar er avgjørt nakað, sum eigur at verða tikið við, tá hugsað verður um at skilja tann smáa fiskin frá á botni. Gluggameskar fiska bara fisk, sum kemur til høldar og næstan einki verður útblakað.

ELI GUTTESEN

Royndirnar hava víst at gluggameskar síla nógv betur enn vanligir meskar í posanum. Royndir vórðu gjørdar bæði við vanligum posa og posa við gluggameskum. Tað vísti seg at vanligi posin fekk nógv meir av fiski undir 35 cm. Sera áhugavert var at posin við gluggameskum fekk meir av stórum upsa enn tann vanligi posin.

Trolposin skip brúka í dag tekur ov nógvan smáfisk. Meskarnir hava ringt við at opna seg nóg mikið, so at smáur fiskur sleppur úr aftur posanum. Hetta kemst av at tað stendur javnt á øllum meskunum í trolinum meðan tóvað verður og tí eru meskarnir næstan saman.

## Gluggameskar stívari

Fyri at bøta um hesi viðurskifti hevur fiskirannsóknarstovan gjørt royndir við sokallaðum gluggameskum. Hetta eru serligir meskar, sum eru lagdir í eina plastblanding so teir eru stívari enn og hava annað skap enn vanligir meskar. Teir eru ikki fýrakantaðir, men hægri enn teir eru breiðir fyri at líkjast skapinum á einum fiski mest møguligt. Hesir meskar (stykkir) verða sett í síðuna á trolposanum. Hetta kemst av at royndir hava víst, at fiskur sum sílar gjøgnum síðuna á posanum, fær lítið og einki mein. Um fiskur sílar út gjøgnum takið á posanum fær hann størri mein.

## Royndirnar

Royndirnar hava víst at gluggameskar síla nógv betur enn vanligir meskar í posanum. Royndir vórðu gjørdar bæði við vanligum posa og posa við gluggameskum. Tað vísti seg at vanligi posin fekk nógv meira av fiski undir 35 cm. Sera áhugavert var at posin við gluggameskum fekk meira av stórum upsa enn tann vanligi posin.

Tann fiskur, ið ikki kemur til høldar hevur sera lítlan prís í Føroyum, tí mælir kanningin til at nýta gluggameskar so at so lítið sum møguligt verður útblakað aftur. Hetta er higartil besti máti at skilja fiskin á botni.



Smáfiskurin sleppur út gjøgnum gluggameskarnir í síðuni á posanum, meðan trolið gongur eftir botninum.

Mynd: Fiskirannsóknarstovan

# Mistu húsini sjálvan brúdleypsdagin



Eldurin er kyknaður í skotinum undir altanuni, har eitt lítið úthús stóð sum børn plagdu at spæla í. Húsini eru illa farin av eldi og nærum øll loftshæddin er brend.

Mynd: Hilmar Jan Hansen

Um hálvgun ellivu tíðina í gjáramorgunin kom eldur í húsini hjá Byrgi og Randi Petersen í Fútalág.

ELI GUTTESEN

Granni sá nógvan royk úr eystara endanum á húsinum tá klokkan var farin av tíggju í gjáramorgunin og fór beinanvegin at boða frá eldinum. Fyrst var snara 000 men har svaraði ikki, síðan var roynt á 11448 og tá gekst betur.

Løtu seinni var sløkkiliðið á staðnum og tá stóðu húsini í ljósum loga. Farið var beinanvegin undir at sløkkja. Stórt mannskap var møtt frá sløkkiliðnukm, og farið var undir at bjarga innbúgvi úr húsinum. Grannarnir og onnur hjástødd gjørdu alt fyri at hjálpa til at bjarga tíð, ið bjargast kundi. Alt innbúgv av týdningi varð bjargað úr húsinum í ein kjallara í grannahúsunum.

Hálvan tíma eftir, at sløkkiliðið var komið á staðið var eldurin bastur.

## Eldurin

Eldurin var kyknaður í einum lítlum úthúsi, ið stóð í einum skoti eystarumegin húsini. Hann hevur so fest í húsaklædningin og síðan í altanina omanfyri. Stórsti skaðin er hendur í erva á húsinum, sum hevði høga reising við innrættaðari loftshædd. Nærum øll lofthæddin og eystara síðan á húsinum er illa farin av eldi. Ógreitt er í løtuni um húsini kunnu umvælast ella verða rivin niður og bygd uppaftur av nýggjum.

## Úthúsið

Fyri seytjan árum síðani nýtti eigarin úthúsið sum skýlið hjá tveimum heimalombum hann tá hevði. Síðani hevur hann ikki gjørt nakra nýtslu av hesum. Men børnini í grannalagnum plaga viðhvørt at spæla í húsinum. Tí kundi verið hugsandi at orsøkin til eldin er, at børn hava spælt við eld í húsinum.

## Sjálvan brúdleypsdagin

Byrgi og Randi Petersen eiga húsini, sum vórðu bygd í 1968. Tey vóru bæði farin til arbeiðis í gjáramorgunin og høvdu ikki merkt nakað óvanligt.

– Men dagurin er ikki heilt óvanligur. Hetta er júst brúdleypsdagur okkara og hvørgin okkara hevði vænta at ein so dapur hending skuldi raka okkum júst ein slíkan dag. Dagurin lagaðist ikki so sum vit høvdu ætlað.

– Men gott var at eingin fólkaskaði stóðst av hesum. Og øll sum hjálptu til at bjarga sum frægast, skulu eiga stóra tøkk fyri hjálpina. Eg skilji ikki heilt tað sum hent er enn, men dagurin er í øllum førum oyðilagdur, sigur Byrgi Petersen.